# Páll á Reynatúgvu 40 ár

Hósdagin 26. juli fylti Páll á Reynatúgvu 40 ár. Páll er løgtingsmaður og borgarstjóri á Sandi.

Páll er ættaður av og búsitandi á Reynatúgvu á Sandi. Foreldrini eru Ada og Niels á Reynatúgvu, Pápin doyði í 1982, tá ið Páll var 14 ára gamal. Ada og Niels fingu fýra børn: Niels Jacob (1951), Anna (1953), Hanna (1959) og Páll (1967). Niels Jacob, sum var lærari á Meginskúlanum, doyði longu í 1983. Anna býr á Sandi, og Hanna býr í Skálavík.

Eftir samfelagsmálsligt studentsprógv í Hoydølum í 1988 arbeiddi Páll hjá J&K Petersen, Strandferðsluni og á Landssjúkrahúsinum. Í 1993 var hann útbúgvin fysioterapeutur í Århus, og í 1997 diplomfysioterapeutur innan leiðslu og undirvísing. 1993-97 var Páll nevndarlimur í felagnum Føroyskir Fysioterapeutar.



Síðani 1998 hevur Páll umboðað Tjóðveldisflokkin í Sandoyar valdømi í Løgtinginum. Fyrsta skeiðið var hann formaður í trivnaðarnevndini. Nú er hann limur í fíggjarnevndini. 6. juni 2002 og til 5. desember 2003 var Páll landsstýrismaður í almennamálum.

Á nýggjárinum 2001 gjørdist Páll borgarstjóri á Sandi. Ta ábyrgdina hevur hann røkt síðani burtursæð frá, tá ið hann var landsstýrismaður.

Í politikki er Páll ógvuliga avgjørdur – bæði sum umboð fyri Sandoyar valdømi og sum tjóðveldismaður. Hann er kringur í politiska orðaskiftinum og sum røðari í øðrum høpum, og tað hoyrist, at hann hevur lisið nógv og hevur stóra almenna vitan.

Páll er giftur Kristinu født Jóhannesen. Hon er dóttir Ásleyg og Óla F. Johannesen í Húsavík. Tey eiga fýra børn: Ása (1998), Ida (2000), Niels (2005) og Óli (2006). Kristina J. á Reynatúgvu er sjúkrarøktarfrøðingur og starvast sum leiðari í eldratilhaldinum Hugnin á Sandi.

Páll er óðalsmaður. Jørð lá barnaheimið og til heimið hjá konuni, og Páll og konan hava keypt afturat undir Fjalli á Sandi. Pálli dámar væl at fáast við seyð, honum líkar væl at vera í náttúruni og at fáast við hoyggj, fjalgongu, fletting og alt tað, sum hoyrir fenaðinum til.

Páll er ítróttarmaður um ein háls. Hann kom á besta liðið hjá B71 longu í 1983. Hann var við til at lyfta B71 úr 3. og upp í 1. deild, har hann í 1989 var ein av miðvallarstuðlunum á góða meistaraliðnum hjá sandoyingum.

Fimm ferðir hevur Páll verið á fótbóltslandsliðnum. Fyrsta ferðin var á útivølli ímóti Belgia 22. mai 1993. Eingin ivi var um fótbóltstalentið, men her, sum í øllum øðrum viðurskiftum, hevur áræðið og viljin eisini havt stóran týdning hjá Pálli, sum fríggjakvøldið hevði opið hús á Reynatúgvu.

**J**

# Landsskjalasavnið 75 ár

- Ein stovnur í støðugari menning. Hvørt ár vitja eini 2500 fólk lesistovu og á framsýningum, sum savnið skipar fyri.

Fyrsta juli í ár vóru 75 ár liðin síðan Landsskjalasavnið varð sett á stovn. Stovnurin, sum heldur til í fýra ymiskum húsum, í Havn, hevur skrivstovu í gomlu Postmeistarahúsunum í V.U.Hammershaimbsgøtu 24 á Debesartrøð

Endamálið hjá stovninum er at savna, varðveita, skipa og at røkja øll søgulig skjøl og keldur.

Umframt at stovnurin sjálvur ger uppsøkjandi arbeiði, koma fólk eisini og handa savninum skjøl.

Landskjalasavnið hevur stórar goymslur. Kongsbókin, frá 1298, er elsta savnindi, ið er varðveitt á savninum, ið eisini goymir øll embætsissøvn hjá bæði føroyskum og ríkssmyndugleikum. Savnið hevur m.a. kort, brævaskifti, tekningar, mikrofilmar og filmar í varðveitslu.

Landsskjalasavnið hevur í dag, eftirlit við umleið 15 kilometur langari røð av almennum skjølum, sum eru í varðveitslu á ymsu stovnum kring í landið. Harafturat veitir savnið ráð og vegleiðing til feløg og privat virki um bygnað og um hvussu skjøl teirra verða varðveitt á besta hátt.

Øll kunna koma á Landsskjalalasavnið, og biða um loyvi at síggja skjøl, Umframt nógvar munnligar og skrivligar spurningar, vitja eisini nógv fólk lesistovuna. Størsti partur av hesum eru fólk, sum fáast við ættargransking og ættarsøgu.

Landsskjalasavnið fer at hátíðarhalda 75 ára dagin við stórari ráðstevnu, í Norðurlandahúsinum, fríggjadagin 31. august og leygardagin 1. september 2007.



*Landsskjalavørðurin og løgmaður við Kongsbókini. Bókin er sera viðkvom, og ikki er loyvt at nerta bókina uttan í hanskum*

†

## Andlát og jarðarferðir

Leygardagin 28. juli andaðist Marin Kristina Wang, Hvalba, 81 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

Fríggjadagin 27. juli, andaðist **Martin Petersen, Kambsdalur**. Jarðarferðin verður hósdagin 2. august klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Martin, kunnu lata børnunum eina gávu, konta í Eik.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæri maður, faðir, sonur og bróður

**Martin Petersen**
Kambsdalur

andaðist fríggjadagin 27. juli, 45 ára gamal.
Jarðarferðin verður hósdagin 2. august kl. 14 úr Fuglafjarðar kirkju.

*Familjunnar vegna*
**Kona, børn, systkin og foreldur**

Tey, ið vilja minnast Martin, kunnu lata børnunum eina gávu.
Konta í Eik

# Tøkk

Øllum teimum mongu, sum á ymiskan hátt mintust meg á mínum 80 ára føðingardegi takki eg hjartaliga

**Heilsan**
**Palma Dal-Christiansen**

## Starvsdagur



1. august 2007 hevur Steen J. Pedersen, Argir starvast í 25 ár hjá elfelagnum SEV sum kaðal- og linjumeistari og deildarleiðari.

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Dagurin**
**11. august. Hermann.** Einki kent halgimansnavn, men er komið upp í álmannakkan í staðin fyri Tiburtius.